# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit eru á knøunum við reyvini í vatnskorpuni*
*HB-heimasíðan*



*KÍ'arnir stríddust ein fyri allar og allir fyri ein – og teir skoraðu einasta málið í dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## HB-KÍ 0-1 (0-0):

# KÍ kollektivið vísti tenn

**Favorittarnir í HB høvdu onga tyngd, og í 2. hálvleiki, tá ið teir mistu sítt egna spæl fullkomuliga burtur, var stinna KÍ verjan teimum ov boysin**

**HB-KÍ**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*HB*

*KÍ*

Tað var stór frøði í KÍ ferðalagnum í Gundadali í gjárkvøldið. Og tað var ikki so undarligt. Í á pappírinum torføru avbjóðingini á útivølli ímóti HB hevði tað eydnast at vinna 1-0. Harvið komu trý stig inn á KÍ kontina.

Stigini eru sjálvandi kærkomin. Fyrr í ár hevur KÍ ikki fingið fult í dystum, sum teir ivaleyst hava roknað við skuldu geva fulla úrtøku. Nú vunnu teir fult burturúr dysti, sum teir kanska hava vónað at fingið eitt stig burturúr.

Tað er týdningarmikið at eiga spælararnar, sum eru førir fyri at skjóta mál og harvið at avgera.

Á pappírinum eigur HB fleiri av tí slagnum, enn klaksvíkingar eiga. Hesa ferð var álopið mannað við landsliðsspælarunum Christian Høgna Jacobsen og Andrew av Fløtum.

HB álopið gjørdi einki mál. Onkra ferðina vóru teir tætt við. Landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, vísti onkra góða bjarging, men tað var ikki so ofta, at hann noyddist at vísa síni góðu evni. Superveteranurin Harley Bertholdsen bjargaði tvær ferðir á strikuni eftir hornasparksinnlegg, og eina ferð sendi gjøgnumbrotsstinni miðvallarin Ólavur í Ólavsstovu í tværtræið. Andrew av Fløtum rakti eina ferð í ytru síðuna á stólpanum, men ta ferðina tóktist Jákup Mikkelsen at hava tak á støðuni.

Sigursmálið syrgdi væl upplagdi Rodrigo Silva fyri beinanvegin í 2. hálvleiki. Harley Bertholdsen kastaði inn úr høgru, Rodrigo tamdi, sneiddi ímillum fleiri, og tá ið hann hevði rikið inn í brotsteigin smekkaði hann til, og bólturin sang í handara síðunetinum.

Eitt einmansavrik av teimum frægu, og einmansavrik sum bar trý kærkomin stig við sær.

### Tað stóð nógv á

Landsliðsspælararnir hjá HB megnaðu ikki at skjóta mál. Tað átti KÍ kollektivið stóran heiður fyri. Hesa ferð var KÍ verjuskansin settur longri frammi á vøllinum, enn hann hevur verið fleiri ferðir fyrr í ár. Kristian á Lakjuni og Kristoffur Jakobsen vóru sera eyðsýndir á sentrala miðvøllinum, har teir bæði spældu væl og gingu undan í at stríðast.

Heðin á Lakjuni hevði tíðliga góða roynd, sum Tróndur Vatnhamar bjargaði meistarliga.

Síðstu løtuna undan steðginum vísti HB eyðkenda skjóta samanspælið, og tá høvdu teir onkrar møguleikar. Eitt nú hevði Rógvi Poulsen góðan stútara.

Eftir steðgin spældi KÍ seg út aftur, og eftir leiðslumálið var um reppið, at klaksvíkingar øktu um leiðsluna, men rimmar skoti hjá vinstra vongverja, Sigmundi Jacobsen, brast í tvørtræið.

Sum tíðin leið, øktist HB trýstið. Men eyðkenda konseptið hjá teimum svørtu og reyða sást lítið og einki til. Høgar og langar sendingar vórðu lagdar í brotsteigin, har nógvir hvítir og bláir vóru, og har Ovi Nysted og Milan Curcic høvdu ræðið í luftkrígnum.

Klaksvíkingar ofraðu seg ein fyri allar og allir fyri ein, og teir hildu tørn.

Men tað stóð nógv á, og í yvirtíðini tóktist tað sum um, at liðformaðurin Hans á Lag javnaði til 1-1. Hann stútaði upp um Jákup Mikkelsen, bólturin rakti stongina, og á strikuni eydnaðist Ova Nysted at sparka burtur, og tá ið dómarin gjørdi seg til at bríksla fyri síðstu ferð var um reppið, at Kristian á Lakjuni økti um leiðsluna.

Tróndur Vatnhamar bjargaði, og tá ið dómarin hevði bríkslað tóktist tað ikki, at Kristian og hinir í KÍ iðraðu seg nakað serligt um misnýtta møguleikan!

## Sjey ár síðani seinast

Tað er ikki á hvørjum degi, at KÍ hevur øll stigini við norður aftur, tá ið klaksvíkingar hava vitjað javnaldrarnar í HB. Tølini siga, at 1-0 sigurin mikukvøldið var tann fyrsti á útivølli ímóti HB síðani í 2001.

Ta ferðina vann KÍ 2-1. Rógvi Jacobsen skoraði fyri HB, og Kurt Mørkøre og Fríðin Ziskason skoraðu fyri KÍ. Lagið var ikki minni gott ta ferðina, tí sigursmálið varð skorað í 88. minutti.

- Sjálvandi eri eg nøgdur. Hetta var 8. ferðin á rað, at vit ikki taptu, og hetta var onnur ferðin á rað, at einki mál fór ígjøgnum hjá okkum. Hugburðurin var góður, og í løtum útinntu vit til fulnar tað, sum vit høvdu avrátt, staðfesti væl nøgdi KÍ venjarin Eyðun Klakstein.

## Botnurin er náddur

Tað var ringur hýrur í HB leguni, tá ið dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð. FM vónirnar eru ógvuliga kámar. HB hevur bara vunnið fimm av ellivu dystum.

Fróði Benjaminsen var leikbannaður, og Jákup á Borg gav avboð, tí hann var sjúkur. Síðstu løtuna fingu unglingaspælararnir Ingvard Vang og Jóan Petur Holm møguleikan. Vónin var, at royndu menninir sum eitt nú Christian Høgni Jacobsen, Andrew av Fløtum og Páll M. Joensen skuldu standa fyri málunum. Tað megnaðu teir ikki.

- Vit eru á knøunum við reyvini í vatnskorpuni. Hetta var ein lemjandi ósigur, og mátin at tapa uppá gjørdi tað enn meiri hugstoytt, er staðfestingin á almennu heimasíðuni hjá HB, har tað verður staðfesti, at botnurin er náddur, og at tað nú mugu bollar í suppuna.